# Bilar

Nr. 97 • hósdagur • 27. mai 2005 • 79. árg.

Volkswagen:

# 100 milliónir bilar í 60 ár




*Hátíðarhald á verksmiðjuni í Wolfsburg 24. mai 2005 tá VW bilur nr. 100.000.000 fór av verksmiðjuni*



*Fyrsta VW-Boblan kom á marknaðin í 1945. Bilurin varð framleiddur í 21,5 mill. eindum*

**24. mai 2005 koyrdi ein silvurgráur VW Touran út av VW-verksmiðjuni í Wolfsburg. Tað serliga við hesum bili var, at hann var bilur nr. 100.000.000 hjá VW, síðan fyrsta VW-Boblan kom á marknaðin fyri 60 árum síðan í 1945**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Volkswagen kunnu í ár hátíðarhalda, at liðin eru 60 ár síðan fyrsta VW-Boblan (Type 1) kom á marknaðin. Samstundis eru 70 ár liðin síðan tann fyrsta prototypan av bilinum sum Perdinand Porsche konstrueraði varð gjørd. Í dag er Volkswagen ein av heimsins størstu bilframleiðarum. Fyrstu VW-bilarnir vóru Boblan og Transporter (rugbreyðið).

Av teimum mest kendu og mest framleiddu Fólkavognunum kunnu vit nevna, at Boblan varð gjørd í 21,5 mill. eindum, Golf er higartil framleiddur í 23 mill. eindum, Passat í 9 mill, og Polo í næstan 9. mill. eindum. Í 2002 fór framleiðslutalið á Golfinum fram um Bobluna. Volkswagen verða annars framleiddir í nógvum ymiskum londum sum t.d. Brasilia, Mexico, Argentina, Polen, Spania og Kina.

## Alkotest til Saab



Saab eru í løtuni í ferð við at seta alkolás í nakrar hundrað bilar fyri at testa sín egna teknikk. Um tvey ár skal alkolás, har bilurin ikki startar, um bilførarin hevur drukkið alkohol, fáast sum eykaútgerð í øllum Saab bilum

*Kelda: www.blocket.se*

## Ka student



Undir slagorunum "Álop er besta vápnið" eru Ford nú farnir í kapping við hinar evropeisku bilverksmiðjurnar við Ford Ka Student, ið verða seldir fyri sera kappingarførar prísir

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai Grandeur



Stóri luksusbilurin Hyundai XG350 verður nú avloystur av nýggja Grandeur, sum í USA fær navnið Azera. Bilurin er bæði størri og rúmligari og hevur alla hugsandi útgerð. Bensinmotorarnir byrja við 3,3 litur V6 við 233 hk

*Kelda: Motor Magasinet*